# Atli fekk fult

Lagið í Frem leguni er gott. Frem vann 1-0 móti Frem í Valby, og sigurin var ógvuliga kærkomin. Hann ber við sær, at Frem lyftir seg uppaftur longur frá niðurflytingarhóttanini. Hon hevur kenst stór, síðani DBU í vetur gjørdi av, at Frem orsaka av fíggjarligum óskili skuldi missa seks stig. Atli Danielsen var aftur í dag á Frem miðvøllinum, har hann hevur týdningarmiklan leiklut. Málið í dag skoraði Fosu Boateng í 9. minutti. Mikukvøldið var Frem partur av málleysum javnleiki, tá ið teir spældu í Nykøbing ímóti NFA.



# Bayern nærkast gullinum

Týska felagið FC Bayern er nær við at vinna enn eitt meistaraheiti. Um vikuskiftið vann Bayern heili 5-0 ímóti Dortmund, sum teir eisini skulu spæla steypafinalu ímóti. Toppskjúttin Luca Toni gjørdi tvey av málunum. Bayern er heili 10 stig frammanfyri næstfremsta liðið í týsku bundesliguni, nú seks umfør eru eftir at spæla.

EB/Streymur-B68 3-1 (1-1):

# Arnbjørn flongdi uppflytararnar

*EB/Str.*

*B68*

**Við hattrikki var Arnbjørn Hansen stóri sigursharrin, tá ið hann og EB/Streymur heima við Margáir vunnu 3-1 á uppflytarunum úr B68**

FÓTBÓLTUR
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*



*Tað tók sína tíð áðrenn EB/Streym megnaði at basa B68*
*Mynd: Sofus D. Johannesen*

EB/Streymur vísti ikki nakað sannførandi spæl, tá ið teir á heimavølli fingu vitjan av B68. Toftamenn stríddust sera væl, og hetta gjørdi uppgávuna hjá steypavinnarunum úr Sundalagnum trupla.

### Eingin fótbóltsuppliving

Veðurlíkindini við Margáir vóru á góðari leið. Nøkur vátaslettingsæl vóru at sjá, men hetta darvaði ikki spælinum nakað serligt. Tó var fyrri hálvleikur ikki nakar væl leiktur hálvleikur. B68 stóð væl á vøllinum, og hetta sá út til at bremsa spælinum hjá EB/Streymi, sum ofta hevur sæð betri dagar. B68 royndi seg mest við longum bóltum, og hetta var ikki júst ynskið hjá heimaliðnum, sum av hesi orsøk kom til at geva nakrar málmøguleikar til B68.

Hóast yvirvág til B68, var tað heimaliðið, sum fekk fyrsta málið. Mikkjal Thomassen fekk bóltin á miðjum vølli, og spældi bóltin víðari til Marna Djurhuus. Marni legði síðan ein bleytan bólt til Arnbjørn Hansen, sum vísti hvussu vandamikil hann er, og sendi bóltin í netið til 1-0.

B68 fór tó ikki niður við høvdinum, og hildu fram við at stríðast. Hetta gav úrslit stutt undan hálvleikinum, tá ið teir fingu tillutað brotsspark. Hetta brotssparkið umsetti Jann Ingi Petersen til mál, og so kundi B68 sleppa til hálvleiks við javnleiki 1-1.

### Arnbjørn gjørdi bart

EB/Streymur fekk um endan í seinna hálvleiki, og byrjaði at fáa betri skil á uppspælið.

Í løtum sást sera gott spæl, og tað var eisini hetta, ið førdi til, at heimaliðið legði seg á odda. Eitt væl spælt álop í høgru síðu endaði við, at innskifti Marcell Balog sendi bóltin fyri føturnir á Arbirni Hansen, sum við sínum næsta máli legði EB/Streym á odda 2-1.

Felagsliðið úr Sundalagnum fekk enn eitt mál í dystinum. Hanus Eliasen legði væl innfyri úr høgru, og hvør annar enn Arnbjørn Hansen setti bóltin í netið. 3-1 gjørdist endaliga úrslitið, og við sínum trimum málum gjørdist Arnbjørn Hansen stóri munurin millum liðini, sum ikki góvu væl uppmøttu viðhaldsfólkunum nakra stóra fótbóltsuppliving.

EB/Streymur hevur framvegis fult stigatal við seks stigum fyri tveir dystir, meðan B68 má halda fram við at jagstra teirra fyrstu stig.

## Gjørdi mína skyldu

Trífaldi málskjúttin hjá EB/Streymi, Arnbjørn Hansen, var ikki fegin um nógv annað enn úrslitið eftir dystin.

- Har var als ikki nógv gott at peika á. Bara málini gjørdi munin. Vit vunnu alt ov fáar bóltar, og B68-leikararnir vóru nógv grammari enn vit, segði Arnbjørn peikandi á, at serliga miðvøllurin ikki spældi væl.

22 ára gamli kollfirðingurin hevur í fleiri atløgum verið í landsliðshitanum, og eigur eisini nakrar landsdystir á baki. Hann hevur framvegis vónir um at bíta seg fastan á landsliðnum, og hattrikkið gjørdi neyvan vónirnar verri.

- Hattrikk skorar tú ikki hvønn dag. Men ein áleypari skal helst skjóta mál, og tað var tað eg gjørdi, segði ein heldur róligur Arnbjørn Hansen.

## Væl nøgdur við avrikið

Einasti málskjúttin hjá B68, Jann Ingi Petersen, var, hóast tapið, væl nøgdur við avrikið hjá liðnum.

- Vit spældu ein góðan dyst, og eg meti ikki, at hatta var eitt rættvíst úrslit. Vit standa sera væl á vøllinum, og teir koma ikki fram til nógvar málmøguleikar. Men teir eru eitt topplið, og hava hepnið við sær, heldur Jann Ingi.

Tvey tap í tveimum teimum fyrstu dystunum, og málúrtøkuna 2-7. Er hetta nøktandi?

- Sjálvandi er tað keðiligt at hava latið sjey mál inn, men vit eru byrjaðir at skapa nógv fleiri málmøguleikar. Liðið er eisini væl betur mannað nú, enn við kappingarbyrjan, sigur Jann Ingi Petersen at enda.

Vit átaka okkum alt arbeiði innan hita, vatn, ventilatión og sanitet.



JJ RØR
Høgni M. Joensen
Kristiansgøta 41 · FO-188 Hoyvík · Tel. 233040 / 233041

Fótbóltskappingin

